

Magnus Tausen, formaður Lærarafelagsins

# Løgtingið er til reiðar!



Eftir aðalorðaskifti eri eg ikki í iva um, at løgtingslimir eru sinnaðir at játta pening til ávís tiltøk í fólkaskúlanum.

Framsøgufólkini tóktust væl fyrireikað. Eftir at Marius Dam í sambandsflokkinum fekk ábreiðslur fyri sína ov lítið ítøkiligu røðu, løgdu hini framsøgufólkini seg eftir at taka fram ítøkilig stig, sum skulu verða tikin. Serliga áhugavert í hesum sambandi var, at tað bar ikki til at siga hvørjir flokkar vóru í samgongu og hvørjir í andstøðu. Hetta gamla stríð var mestsum lagt til viks, og tað gav aðalorðaskiftinum neyðugu dygdina. Her má eg nevna, at tá ið Tjóðveldisflokkurin beinleiðis spurdi, um andstøðan fór at verða tikin við í viðgerðina, sum nú skal vera, var svarið frá landsstýrismanninum "sjálvandi". Tað haldi eg gevur góða vón um ta breiðu semju, sum okkum tørvar.

Tað undraði meg, at tingfólk vóru so samd um at kalla øll viðurskifti. Samstundis gleðir tað meg, tí so kunnu ítøkilig stig verða tikin skjótt. Undirvísingartímatalið í yngru flokkunum skal verða hækkað og játtanin til undirvísingartilfar økjast. Umframt hetta fekk landsstýrismaðurin viðmæli frá tinginum til at kalla øll tiltøk, hann hevur tikið fram. Eitt tiltak fekk tó lítla undirtøku. Løgtingið er ikki sinnað at lata skúla út til kommunurnar, og tí vóni eg, at landsstýrismaðurin letur tað málið liggja fyri fyrst og leggur seg eftir teimum málum, sum løgtingið er sinnað at stuðla honum í.

### Smíða meðan jarnið er heitt!

Tá ið løgtingið hevði talað, var landsstýrismaðurin í útvarpsstovuni. Og enn eina ferð kom fram, at hann hevur leiklutin sum afturhaldsmaður. Tað skilji eg ikki, og eg heiti á Jógvan á Lakjuni um at arbeiða skjótt. Eg dugi ikki at síggja, hvussu nakar landsstýrismaður kann fáa betri grundarlag at arbeiða út frá, enn Jógvan á Lakjuni fekk frá tinginum.

Eg vóni, at landsstýrismaðurin tekur til sín, at flokkarnir á tingi vilja hava broytingar skjótt, og at hesar broytingar fara longur enn landsstýrismaðurin sjálvur hevur skotið upp. Føroysk børn skulu skjótt fáa líka nógvar undirvísingartímar sum børn í grannalondunum, og tey skulu kunna fáa undirvísing við góðum føroyskum tilfari.

Tað eru framvegis viðurskifti, sum arbeiðast skal við, og sum ikki fingu so nógva viðgerð í tinginum. Eg kann nevna eftirútbúgving hjá lærarum og styrkt Mentamálaráð. Tó haldi eg, at løgtingsfólk í síni viðgerð staðfestu ferð eftir ferð, at lærarastarvið er ómetaliga týdningarmikið, og at aðalráðið, sum varðar av undirvísing, má hava bestu umstøður at arbeiða undir.

"Rom var ikki bygdur eftir einum degi", verður ofta sagt, og hjá fólkaskúlanum er enn langt á mál. Men tá ið Løgtingið er til reiðar at gera sítt, so er arbeiðið longu komið væl áleiðis.

Birgir Kruse er ritsjóri á Føroya Skúlabókagrunni

# Fremstu samfeløgini hava bestu útbúgvingarnar



*- Hvat fekst tú sum heild burtur úr orðaskiftinum ?*

Eg fekk nógv burturúr framløgunum hjá Andriasi Petersen, Heidi Petersen og Bill Justinussen. Greitt og visjonért. Tey høvdu ítøkiligar niðurstøður, ið bendu á, at flokkarnir høvdu viðgjørt málið væl og virðiliga. Eg hefti meg serliga við orðini hjá Andriasi, um at fremstu samfeløgini altíð eru tey, ið hava bestu útbúgvingarnar. Staðfesting hansara, at "tað eru bara positivar samfelagskorrelatiónir til útbúgving" vóru helst bestu orðini, søgd á tingi.

Heidi, ið var samd við Andriasi, viðgjørdi eisini móðurmálið sum megin-nervalagið í læruverkinum. Eftir hetta var serliga gott at hoyra Lisbeth Petersen úr Sambandsflokkinum viðmerkja, at í skúlanum skuldi føroyskt lærast "væl og virðiliga". Av áhoyraraplássunum stóð samgongan BCE eina løtu bjørt á nethinnuni.

*Hvussu metir tú útlitini vera fyri, at umstøðurnar í fólkaskúlanum fara at batna?*

Landstýrismaðurin er varisligur í frágreiðingini um fólkaskúlan. Nøkur framsøgufólk gjørdu vart við hetta og vildu ganga longri og skjótari, at fáa ein betri skúla. Tað er eitt gott tekin. Til samanberingar kann nevnast, at inntrivini hjá landstýrismanninum, ið eru til allan fólkaskúlan í trý ár, tað er 7000 næmingar, hvørt av trimum árum, kosta akkurát tað sama, sum dagsins meirútreiðslur til eittans skúla í Hovi. Spurningurin er, um tinglimir kunnu møta framtíðini við hesum perspektivi.

*Hvørji inntriv hevði tú raðfest fremst, ráddi tú?*

Betri skúlabyrjan og fleiri tímar til henda part av skúlagongdini, uttan at taka frá øðrum floksstigum. Her skulu nýggir pengar til. Leggja vit fleiri tímar inn í talvuna, so krevur tað tilfar. Tíðin er farin frá at lærarar undirvístu, undirhildu, skrivaði og leiktu. Hetta hava vit professionell fólk til í dag. Fáa tey umstøður, so kunnu tey eftir stuttari tíð gera hópin av frálærutilfari. Men tað kemur ikki av sær sjálvum. Og so slettis ikki úr kopimaskinuni. Her er eitt stórt potensiali, sum bara tinglimir kunnu seta í gongd.

Jóan Petur Hentze, aðalskrivari í Kommunusamskipan Føroya

# Kommunurnar áttu at umsitið skúlaøkið



*Hvat fekst tú sum heild burtur úr orðaskiftinum?*

Aðalorðaskiftið um fólkaskúlan í gjár var líkt so nógvum øðrum aðalorðaskiftum – nógvir ymsir tættir vórðu viðgjørdir leyst og fast, góðviljin at gera batar stórur, men trupult er at gera nakra veruliga niðurstøðu, sum líkasum kann binda tað heila saman aftur.

Tó var týðuligt, at orðaskiftið var merkt av stórum álvarsemi og konstruktivum hugburði, men sum leið út á dagin – og tingfólk komu aftur frá fimmtiárahaldinum í kringvarpinum – sveimaði kjakið meira vítt og frítt.

Allir flokkar vóru samdir um nærum øll tey stóru málini – at styrkja byrjanarundirvísingina, betri undirvísingartilfar, styrkja leiðslurnar, styrkja læraraførleikarnar v.m. Har sást eingin politisk ósemja.

Sum umboð fyri KSF kundi eg staðfesta, at greið og rættiliga djúp politisk ósemja er í samgonguni um eitt av høvuðstilmælunum, nevniliga tað um at leggja umsitingina av skúlanum til kommununar.

Størsta mótstøðan móti at leggja skúlan út til kommunurnar at umsita kom frá Javnaðarflokkinum – tó mest av reint ideologiskum grundum. Sum áhoyrari saknaði eg veruligar grundgevingar umframt vilja at síggja fyrimunirnar við eini útlegging bæði fyri næmingarnar, samlaðu skúlaskipanina og samfelagið annars.

Dagsins útsøgn átti Poul Michelsen júst um hetta sama (leystliga eftir minninum): Hvat í himmalsins navni vil Javnaðarflokkurin yvirhøvur hava kommunur til, tá ið tær ikki skulu umsita fólkaskúlan, ið náttúrliga hoyrir heima úti millum borgararnar.

Fólkaflokkurin var mest hugaður at leggja skúlan út til kommunurnar – tað sama vóru nøkur av tjóðveldistingfólkunum og Sjálvstýrisflokkurin.

*Hvussu metir tú útlitini vera fyri, at umstøðurnar í fólkaskúlanum fara at batna?*

Landsstýrismaðurin fekk greið boð um, at hann nýttist ikki vera so varin, tá ið um fleiri tímar til 1.-3. flokk ræður. Tað var taktiskt smart gjørt av honum. Hann skuldi eisini fáa meira pening til gerð av undirvísingartilfari. Og Mentamálaráðið skuldi eisini fáa hægri játtan til fyrisiting. So á hesum økjum kunnu í øllum førum væntast batar skjótt.

Men við tí yvirskipaða bygnaðinum – at fáa eitt greiðari ábyrgdarbýtið millum land og kommunur – sær meira svart út við verandi samgongu.

*Hvørji inntriv hevði tú raðfest fremst, ráddi tú?*

Ivist ikki í, at tað rætta er, at kommunurnar umsita skúlaøkið – og tað fyrst og fremst tí, at tað er ein av teimum mest týðandi fortreytunum fyri at menna sjálvt grundarlagið undir skúlanum. Tað vil siga, at vit fáa ein og sama ábyrgdarhavandi myndugleika í beinleiðis og tøttum sambandi við borgararnar á staðnum, ið krevja einki annað enn tann besta fólkaskúlan í øllum tættum. So tað hevði eg raðfest fremst við teirri sannføring, at alt hitt hevði komið nærum av sær sjálvum.